# Bilar

Nr. 221 • hósdagur • 20. november 2003 • 77. árg.



*Renault Megane II innan. Eins og á fleiri nýggjum bilum eru instrumentini í miðjuni á instrumentborðinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Renault Mégane Scénic II

# Størri, rúmligari og tryggari




*Renault Mégane Scénic II 1,6 Comfort Autentique við 115 hk.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Renault Mégane Scenic sum er frá 1996, verður nú skiftur út við ein nýggjan Mégane Scénic II, sum er nakað størri og rúmligari enn forgangarin. Talan er um ein 5 persóna bil, men fyrst í komandi ári kemur eisini ein útgáva til 7 persónar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá Renault Mégane Scénic fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996, var hann fyrsti MPV í sínum klassa. Síðan eru nógvir komnir honum á baki. Nú hava so gott sum øll bilmerkir ein MPV í hesum klassanum.

Nú er so ein nýggjur Mégane Scénic komin, sum er ein nakað størri og rúmligari fimm persóna MPV. Talan er um ein innbjóðandi, væl útgjørdan og vælkoyrandi bil við nógvum hillum og smáum rúmum til at leggja lutir frá sær á.

Bilføraren og tey ferðandi í bilinum sita høgt og hava gott útsýni allar vegir. Girstongin situr í instrumentborðinum og instrumentini eru í miðjuni og ikki framman fyri bilføraran, tó eru tey løtt at avlesa.

Dúrkið er heilt slætt og ein gardanboks fæst til bilin, sum kann flytast frá instrumentborðinum og heilt aftur til baksetrið, soleiðis at tey ferðandi framman og aftan kunnu deilast um hana.

Baksetrið kann flytast soleiðis at viðførisrúmið kann broytast frá 430 til 480 litrar

Mégane Scénic II fæst við trimum bensinmotorum við ávikavist 1,4 litur við 95 hk, 1,6 litur við 115 hk, 2,0 litur við 136 hk, og tveimum dCi turbodiesel motorum við common-rail innspræning: 1,5 litur við 82 hk, 1,9 litur við 120 hk.

Trygdin í Mégane Scénic II er heilt í topp, bilurin fekk fimm stjørnur í EuroNCAP krasj-testunum. Eisini fingu teir heiðurstekin, fyri at bilurin hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir, sum arbeiða væl saman, soleiðis at persónarnir í kabinuni altíð er væl vardir.

Fyrst í komandi ári kemur ein Mégane, sum verður 23 cm longri við trimum røðum av setrum og siti-plássum til sjey persónar.

Byrjunarprísurin fyri ein Megane Scenic II er Kr. 215.000,-




*Baklúkan er stór og lessi hæddin lág. Viðførisrúmið kann broytast frá 430 til 480 litrar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Renault Mégane Scénic II 1,6 Comfort Authentique

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl. bensin 115 hk |
| 0-100 km/t | 12,5 sek |
| Bensinnýtsla | 13,9 sek |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd | 426,0 cm |
| Breidd | 181,0 cm |
| Hædd | 162,0 cm |
| Eginvekt | 1.320 kg |
| Viðførisrúm | 430 - 480 litrar |
| Prísur | kr. 235.000,- |
| <u>Søluumboð</u> | VR Bilar<br>Hoyvíksvegur 61<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 322110 |






*Økisstjórin hjá Toyota Danmark A/S, Jørgen Steen Frederiksen, handar her stjóranum á Reyni Service, Eivind av Reyni, TSM gókenningina*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Reyni Service:

# Toyota Service Marketing góðkenning

**Týsdagin 18. november fekk Reyni Service í Hoyvík góðkenning eftir nýggja TSM-standardinum hjá Toyota. Fyri fimm árum síðan fekk fyritøkan eisini góðkenning frá Dansk Automobil Forhandlerforening, DAF**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Á middegi týsdagin vóru øll starvsfólkini hjá Reyni Service savnaði í hugnaligu kantinuni í Hoyvík. Orsøkin var at økisstjórin fyri Føroyar hjá Toyota Danmark A/S, Jørgen Steen Frederiksen, handaði teimum eitt certificat, nú teir vórðu góðkendir eftir nýggja TSM-standardinum hjá Toyota.

TSM stendur fyri Toyota Service Marketing. Hetta er eitt konsept, sum er við til at tryggja, at fyritøkan framvegis er millum tær fremstu og búgvin at taka ímóti teimum stóru avbjóðingunum, sum eru fyri framman.

Hugsjónin aftan fyri konseptið er: Tænasta á høgum støði og kvalitetur til kappingarførar prísir saman við at kundanøgdsemi. Samstundis tekur konseptið støði í kjarnuvirðunum hjá Toyota, sum t.d.eru: Kvalitetur, nýhugsan, individualitetur, innliving og at duga lurta eftir kundanum.

Toyota Service Marketing er ment við støði í heimskenda "Lean Production System" hjá Toyota, sum verður brúkt í sambandi bilaframleiðsluna.

Skipanin hevur verið við til at tryggja Toyota sum ein av heimsins effektivastu bilaframleiðarum av veruligum kvalitetsproduktum.

Fyri fimm árum síðan bleiv Reyni Service eisini góðkend av Dansk Automobil Forhandlerforening, DAF.




*Starvsfólk og leiðsla hjá Reyni Service hava samstarvað um at fáa fyritøkuna TSM góðkenda. Á fyritøkuni arbeiða umleið 50 fólk*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*